Uppskot til semju millum:

**Starvsmannafelagið øðrumegin**

og

**Fíggjarmálaráðið** hinumegin

Í sáttmálanum partanna millum, sum fór úr gildi 30. September 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

**Sáttmálaskeið og lønarkarmur:**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2019 til 30. september í 2021.

Tann 1. oktober 2019 hækkar mánaðarlønin:

| | |
|---|---|
| Lønarstigini 1 til 21: | 795,00 kr. |
| Lønarstigini 22 til 50: | 595,00 kr |

Tann 1. oktober 2020 hækkar mánaðarlønin:

| | |
|---|---|
| Lønarstigini 1 til 50: | 2,25 %. |

## Broytingar í Sáttmálanum:

**§ 5 Fyribilsstørv og avloysarar**

Sum fyribilsarbeiði er at skilja arbeiði, sum ikki varir longur enn í mesta lagi 6 mánaðir í einum ári. Verður arbeitt meira, er talan um vanligt starv við vanligari uppsagnarfreist frá fyrsta starvsdegi.

Stk. 2. Sum avloysari er at skilja starvsfólk, sum arbeiðir fyri annað navngivið starvsfólk, sum vegna sjúku, barnsburð ella farloyvi ikki er í starvi. Er ikki tilskilað í setanarbrævi í sambandi við avloysing, hvønn viðkomandi avloysir, er starvið at meta sum vanligt starv við vanligari uppsagnarfreist frá fyrsta starvsdegi.

Nýtt stk. 3. Avtalur um fyribilsstørv, avloysarar og onnur størv, ið eru avmarkað í tíð, skulu vera nágreiniligar og skrivligar. Avtalur skulu vera gjørdar við starvsfólkið áðrenn setanin byrjar.

Stk. 4. Frávik frá hesum reglum kunnu bara góðtakast við góðkenning frá Starvsmannafelagnum.

Stk. 5. Fyribilshjálp og avloysarar fáa yvirtíðarløn og eykasamsýningar eftir reglunum í § 22.

**§ 10, nýtt stk. 5**

Frá 1. apríl 2020 verða 12 % í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn, um so er at gjaldið fyri ólagaliga arbeiðstíð ikki verður latið í feriuni.

**§ 24, Sjálvboðið eyka arbeiði**

Eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við langtíðarsjúku, barnsferð ella feriu og tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði.

Stk. 2. Sjálvboðið eyka arbeiði er tá ið starvsfólkið av egnum ávum ynskir sær eitt hægri tímatal enn avtalað er í setanaravtaluni. Bæði fólk í fullum starvi og parttíðar sett kunnu átaka sær sjálvboðið eyka arbeiði.

Stk. 3 Sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað millum starvsfólkið og arbeiðsplássið. Avtalurnar skulu vera skrivligar og skulu vera gjørdar í góðari tíð, áðrenn eykaarbeiðið byrjar.

Stk. 4. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin má vera í minsta lagi tímalønin + vaktargjald II. Tó má hon ongantíð vera hægri enn yvirtíðargjald 2.

Stk. 5. Sjálvboðið eyka arbeiði má bert vera avmarkaða tíð. Álitisfólkið skal verða kunnað um í hvønn mun sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað.

**§ 36 Praktikantar**

Er partur av útbúgvingini skipaður sum praktikk, sum hjá t.d. tíðindafólki og akademiøkonomi, fær praktikanturin 80 % av byrjanarlønini hjá útlærdum. Praktikktíðarskeiðið hjá sosialráðgevalesandi er, sambært galdandi lestrarreglum, ólønt.

Stk. 2. Starvsfólk, ið hevur ábyrgdina av praktiktíðini hjá einum lesandi, fær eina praktikkvegleiðaraviðbót. Hevur viðkomandi starvsfólk, nomið sær praktikkvegleiðaraútbúgving er viðbótin kr. 1.500,00 um mánaðin og fyri tann, ið ikki hevur nomið sær hesa, er viðbótin kr. 1.200,00 um mánaðin, meðan viðkomandi hevur praktikant.

**Viðv. sjófólki**

**§ 40, Yvirtíðarlønir**

Nýtt Stk. 4. Verður í mistu avsparseringstíðini eftir stk. 3 arbeitt í meira enn 12 tímar um samdøgrið (vaktarbrot) verður latin úrtíðarløn 1 fyri 13. og 14. tíman og úrtíðarløn 2 fyri eftirfylgjandi tímar, so leingi arbeitt verður.

**Viðv. SSL:**

**Avloysarar og fyribilsstørv**

Fastir avloysarar kunnu verða settir í fast starv eftir flokking í § 54.

**Arbeiðstíð**

Tá Smyril fer í dokk fylgir manningin skipinum, og manningaskift verður ikki framt í dokkingartíðarskeiðinum. Fyri arbeiði í frívikuni verður veitt 50% afturat vikulønini fyri 91 tímar. (nýggj áseting)

**Nýggja áseting. Kostpeningur**

Sjófólk eiga, tá ið tey sigla, rætt til frían kost umborð. Eisini eiga tey frítt uppihald, kunnu tey ikki búgva umborð, tá ið skipið er heimanífrá, og tá ið ikki ber til hjá teimum at búgva heima, meðan arbeitt verður umborð. Kann ikki matskaffast umborð, verður veitt endurgjald á kr. 107,00 um dagin (kostpeningur). Ber ikki til at sova umborð, skal SSL gjalda kost- og uppihaldspening. Kostpeningurin hækkar til 170,00 kr. um dagin, galdandi fyri tey skip sum ikki hava kokk umborð. Keyp av kosti til skip, sum ikki hava kok umborð, steðgar sama dagin.

**Annað viðv. SSL**

Viðv. § 54. Flokkarnir. Heiti "Genta" verður broytt til tænastustarvsfólk.

**§ 57 Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2019. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2021. Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

## Broytingar í flokkingaravtalu:

**Miðallangar útbúgvingar**

Galdandi frá 1. Oktober 2019: Bachelorar ganga stigini: 17, 18, 19, 20, 21, 23, 25, 27

Flokkingin er ætlað útbúgvingar á støði við professiónsbachelor, ið hoyra til sáttmálaøkið hjá Starvsmannafelagnum. Hetta eru t.d journalistar, sosialráðgevarar, bókavørðar o.o., sum í dag eru flokkað sum professiónsbachelorar.

Skulu aðrar útbúgvingar á hesum útbúgvingarstøði verða umfataðar av hesi flokking, skal tað avtalast sáttmálapartarnar ímillum.

Treyt fyri at verða umfataður av hesi flokking er somuleiðis, at starvsinnihaldið krevur nevndu útbúgvingar.

*Yvirflyting*

Starvsfólk, sum 1. oktober 2019 eru á stigunum 17-21 varðveita verandi dato fyri starvsaldurs-broyting, og verða verandi á sama stigi fram til komandi dato fyri starvsaldursbroyting. Starvsfólk á stig 22 flyta á stig 23 tann 1. oktober 2019 og framtíðar dato fyri broyting av starvsaldri verður 1.

oktober. Starvsfólk á stig 23 flyta á stig 25 1. oktober 2019 og framtíðar dato fyri broyting av starvsaldri verður somuleiðis 1. oktober.

Stig 27 verður tikið í nýtslu 1. oktober 2020.

**Flokking av sjúkraflutningsstarvsfólki:**

| | |
|---|---|
| Leiðandi vaktleiðari | lønarstig 31 |
| Økisvaktleiðari | lønarstig 31 |

Broytta flokkingin fær gildið 1. januar 2019.

**Flokking av deildarleiðarum:**

Deildarleiðarar eru í trimum flokkum:

| | |
|---|---|
| Deildarleiðari 1, gongur | lønarstigini 21-26 |
| Deildarleiðari 2, gongur | lønarstigini 27-33 |
| Deildarleiðari 3, gongur | lønarstigini 34-40 |

## Protokollat viðv. Lønartalvuni:

Partarnir eru samdir um, í sáttmálaskeiðinum, at kanna møguleikan fyri endurskoðan av bygnaðinum av lønartalvuni, og avleiðingarnar av hesum.

Tórshavn 30. januar 2020

*Vegna*
***Fíggjarmálaráðið***

*Jørgen Niclasen*
*landsstýrismaður*

*Jan Mortensen*
*Lønarstjóri*

*vegna*
***Starvsmannafelagið***

*Súni Selfoss*
*formaður*

*Anna Johannesen*
*Felagsskrivari*

*Svend Åge Seloy*
*næstformaður*

*Hilmar Augustinussen*

*Noomi K. Rasmussen*

*Jóngerð Simonsen*